## Góðu næmingar og foreldur

Í skúlanum er desember mánaður á mangan hátt nógv øðrvísi enn aðrir mánaðir í árinum.

Vit hava í adventini hvønn morgun havt felags morgunsang við sangi og tónleiki og hoyrt jólasøgu. Fyri at hugna og fjálga um, hava vit tendrað ljósið í adventskransinum, nú ið vit eru í myrkastu tíðini á árinum.

Mikudagin 14. desember bjóða vit tykkum til jólahald og vóna, at vit í felag fáa eina hugnaliga løtu saman.

Ynski okkara skal vera, at vit í øllum jólastákinum ikki gloyma, at jólaboðskapurin er hini sami:

**Friður á jørð og í menniskjum góður tokki.**

At enda fara vit at ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár og takka fyri gott samstarv í farna ári.

**Skúlin við Løgmannabreyt**

**Høgni Joensen**
skúlastjóri

**<u>Jólahaldið 2011</u>**
## Skúlin við Løgmannabreyt
**mikudagin 14. desember 2011**
**klokkan 16:00 – 18:30**

## Skráin

**<u>Jólahaldið 2011</u>**
Høgni Joensen, skúlastjóri, bjóðar vælkomin

**<u>Felagssangur</u>**
Eg gleðist so hvørt jólakvøld

**<u>3. flokkur</u>**
Sankta Lucia

**<u>6. flokkur</u>**
**Sjónleikur:** Minsti-eingil

**<u>1. – 7. flokkur</u>**
**Sangur:** Nú ringja kirkjuklokkur so hátt

**<u>4. flokkur</u>**
**Sangur:** Her koma Jesus tíni smá

**<u>1. flokkur</u>**
**Sangur:** Føgur er foldin

**<u>7. flokkur</u>**
**Sangur:** Eitt fjós og ein krubba

**<u>2. flokkur</u>**
**Sangur:** So milt lýsir stjørnan

**<u>5. flokkur</u>**
**Sangur:** Fagur himin er at sjá



## Skráin - *framhald*

**<u>1. – 7. flokkur</u>**
**Sangur:** Frelsari føddur

**<u>1. – 7. flokkur + felagssangur</u>**
Gleðilig jól

**<u>1. – 7. flokkur</u>**
**Sangur:** Jólanátt



**Jólavikan 2011**

**Tíðarætlan**

*Mikudagin 14. desember klokkan 16:00-18:30:*
**Jólahald fyri næmingum, foreldrum og systkjum.**

*Hósdagin 15. desember:*
**Jólatræ fyri næmingum í 1. – 9. flokki.**
**Vit dansa jólatræ, og jólamaðurin vitjar.**

*Fríggjadagin 16. desember:*
**Jólaguðstænasta í Hoyvíkar kirkju.**
**Øll møta klokkan 8:00 í skúlanum.**
**Jólaguðstænastan byrjar klokkan 10:00.**
**Tá ið jólaguðstænastan er liðug, hava næmingarnir í 3. – 9. flokki jólafrí. Næmingarnir í 1. og 2. flokki kunnu fara í frítíðarskúla.**

**Farið verður aftur í skúla**
**týsdagin 3. januar 2011 til vanliga tíð.**

# Skúlin
# við Løgmannabreyt



**Leiðsla, lærarar,**
**námsfrøðingar og starvsfólk í**
**skúlanum við Løgmannabreyt**
**takka fyri gott samstarv í brátt farna ári,**
**og ynskja øllum eini**
**gleðilig jól**
**og eitt**
**gott og eydnuberandi nýggjár.**

# Skúlin
# við Løgmannabreyt

## “Jólini nærkast í hvørjum...”



## Vælkomin til jólahaldið 2011